gult cyan magenta svart



# *Gjestal Vestlandsgarn-Superwash*

## Damu og harratroyggjur

| Størrelser: | | liten | middels | stor | xstor | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Overvidde: (plaggets mål) | Ca. | 104 | 115 | 125 | 136 | cm |
| Hel lengde: | Ca. | 70 | 72 | 74 | 76 | cm |
| Ermelengde: | Ca. | 46 | 47 | 48 | 49 | cm |

**MATERIALER: Vestlandsgarn (100% ull) eller Superwash Sport (100% superwash ull), nøster à 50 g.**
**Kan også strikkes i Gjestal Bomull Sport (100% bomull).**

koksgrått nr. 227 eller hvitt nr. 217
= bunnfargen ca. 8 9 10 11 nøster
hvitt nr. 217 eller koksgrått nr. 227
= mønsterfargen ca. 9 10 11 12 nøster

1 glidelås på ca. 25 - 30 cm.

**Pinner:** Rundp og strømpep nr. 2½ og 3½ eller 4. Liten rundp nr. 2½ til genserens halskant.

**Vanlige forkortelser**
M=maske, r=rett, vr=vrang, str=strikk, p=pinne, omg=omgang, vr-bord=vrangbord, glattstr=glattstrikk, rettstr=rettstrikk, vrangbordstr=vrangbordstrikk, kantm=kantmaske, arb=arbeidet, beg=begynn, forts=fortsett, sm=sammen, g=gram, bunnf=bunnfarge.

**Strikkefasthet:** 23 m glattstrikk og mønster i bredden og 27 omg i høyden på p nr. 3½ eller 4 måler 10 x 10 cm. **Husk at strikkefastheten må holdes hvis resultatet skal bli vellykket.**

**Bolen**
Legg opp 240-264-288-312 m med bunnfargen på rundp nr. 2½ og str rundt i vrangbordstr med 2 r, 2 vr, - 2 cm med bunnfargen, 3 cm med mønsterfargen og 2 cm med bunnfargen. Skift til rundp nr. 3½ eller 4 og fortsett videre i glattstr. Str 7-8-9-10 cm rett opp med bunnfargen. Str videre i mønster etter diagrammet - beg ved pilen for din størrelse og gjenta rapporten omg rundt. Gjenta rapporten fra x - x i alt 4 ganger i høyden før du avslutter som mønsteret viser. **Men** når arb måler ca. 48-49-50-51 cm, felles de midterste 13 m på forstykket. Legg opp 4 nye m rett over de felte (til klippem under monteringen) som hele tiden str i "bunnfargen" utenom mønsteret. Str videre rundt. Fell 1 m på hver side av de 4 klippem på hver 4. omg 10-11-12-13 ganger. Når mønsterborden er str ferdig, str videre med mønsterfargen til hel lengde. **Men** når arb måler ca. 68-70-72-74 cm felles de 4 klippem rett av og det str videre frem og tilbake. Fell på hver 2. p mot halsen med 3,2,1 m i hver side. Str til arb måler ca. 70-72-74-76 cm. Fell de resterende m rett av til en pen, jevn kant som ikke strammer.

**Ermene**
Legg opp 48-48-52-52 m med bunnfargen på strømpep nr. 2½ og str vr-bord som på bolen. Skift til strømpep nr. 3½ eller 4 og fortsett videre i glattstr og str mønster etter diagrammet hvor det på 1. omg økes jevnt fordelt til 63-65-67-69 m. Tell ut fra midten på ermet slik at mønsteret blir likt til hver side fra midten. Mønsteret gjentas fra x til x hele veien opp. **Samtidig:** Sett et merke over 2 m midt under ermet ved omg beg og øk 1 m på hver side av merket på hver 4. omg til det i alt er 117-119-121-123 m i omg. Str til ermet måler ca. 46-47-48-49 cm, og slutt et passende sted i mønsteret (eller til ønsket lengde). Snu arb og str 5 omg glattstr til belegg fra vrangen med mønsterfargen. Fell løst av. Str det andre ermet likt.

**Montering og hals**
Merk av til ermehull i hver side tilsvarende vidden øverst på ermene og sy 2 maskinsømmer rundt hvert ermehull på hver side av midtm i sidene. Sy 2 maskinsømmer på hver side av midtm midt foran i "splitten". Klipp opp mellom sømmene. Sy eller mask sm på skuldrene.
Legg opp 12 m med mønsterfargen på p nr. 3½ eller 4 til den ene siden av halskanten og str frem og tilbake i vrangbordstr med 2 r, 2 vr. Øk 1 m i "halssiden" på hver 4. p innenfor 4 kantm (til belegg) som hele tiden str i glattstr. Str de nye m med i vrangbordstr etter hvert. Str til splittkanten fra bunnen av splitten når opp til halsringningen på bolen når den strekkes en liten tanke. Fell av beleggm. Sett m på en tråd og str en tilsvarende kant til den andre siden, men her med økningene i motsatt side. Plukk eller str opp m med mønsterfargen på p nr. 3½ eller 4 rundt halsringningen + m fra trådene til det i alt er 114-114-118-118 m og str videre frem og tilbake i vrangbordstr med 2 r, 2 vr og slutt med 2 r. Str ca. 5 cm, skift til bunnfargen og str 4 cm til på samme måte, skift til mønsterfargen, str 5 cm til og fell løst av i vrangbordstr. Sy halsen pent til i hver side av splittåpningen og sy belegget flatt over sårkanten på vrangen. Tråkle og sy i glidelås (opp til halskanten brettekant). Brett selve halskanten dobbelt mot vrangen (midt i de 4 cm med bunnfargen) og sy den pent til på vrangen.




Sy i ermene fra retten slik: Fest midten av ermet ut for skuldersømmen og sy skiftevis ett sting i m øverst på ermet (før belegget) og ett sting i m innenfor maskinsømmen på bolen (følg samme m langs ermehullet). Sy belegget flatt til over sårkanten på vrangen.

*Press ikke arb, men legg eventuelt plagget flatt i fasong under fuktige håndklær og la det ligge til det er tørt.*




Tógvheilsølan
TRÁÐUR SP/F
Tlf. 312727
Sverrisgøta 19 · Postboks 181 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel +298 31 27 27 · Fax +298 31 96 23 · Mobile +298 21 77 27
Privat: Tel +298 31 66 46



# TIT SPYRJA VIT SVARA



*Bergur Hanusson, djóralækni* · *Heri Joensen, prestur* · *Heri Kragesteen, sálarfrøðingur* · *Ingi Højgaard, løgfrøðingur* · *Jens Andreassen, lækni* · *Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur* · *Jón Klein Olsen, politistur* · *Jón Kragesteen. Ferðslutrygd* · *Julianna Næs, pedagogur* · *Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi* · *Turid Thomsen, lestrarvegleiðari* · *Marius Staksberg, málfrøðingur*

LØGFRØÐINGURIN

### Hvør hevur rætt til at arva

Hetta er fyri okkum eitt pínligt mál, sum eg gjarna vil fáa greiðu og hylling á, soleiðis at vit fáa at vita, hvussu vit skulu bera okkum at, soleiðis at vit kunnu fáa okkara part av arvinum, sum vit halda okkum hava rætt til.

Mamma okkara doyði fyri 30 árum síðani, hon sat í óskiftum búgvi, og tí fellur hennara partur av tí tey áttu tá í tvey, ein helvt ferð til pápa okkara, og ein helvt ferð til børnini.

Pápi okkara kom tey síðstu árini at búgva á ellisheimi, og segði hann sjálvur, at hann hevði tað avbera gott har.

Í fjør vár ringdi eitt av okkara systkjum runt til hini systkjuni og spurdi, um vit høvdu nakað ímóti, at hon fekk húsini hjá pápanum í sín arv. Vit vóru nøkur sum søgdu ja, og nøkur søgdu nei. Nú eftir hansara deyða, vísir tað seg, at uppi í matrikkulnummarinum hjá húsinum er tvey stór jarðarstykkir, sum saman við húsinum hava eitt stórt virði. Eingin av okkum systkjum, høvdu fingið nakrar upplýsingar um at soleiðis var. Vit hava bara givið játtandi ella noktandi svar ígjøgnum telefonina, einki skrivligt svar er givið.

Hesin sami hevur borið so í bandi, at hann eisini hevur fingið flutt allan tann kontanta peningin, sum pápi okkara hevur spart upp, og tað er ikki so lítið yvir á eina kontu hjá sær, við skrivligari samtykt frá pápa okkara, og at viðkomandi eisini hevur syrgt fyri, at fáa tvey ókend vitnir at undirskriva. Pápi okkara var eftir okkara metan í ørviti ta síðstu tíðina hann livdi.

Nú er málið farið í Føroya Skiftirætt, og har fingu vit at vita, at um nakar mótmælti mannagongdini, so skuldi tað gerast har á sama fundi. Tað bleiv síðani gjørt, og hann ið allan arvin hevur fingið, hevur fingið eina freist at gjalda peningin inn aftur á kontoina, har hann áður var.

Mínir spurningar eru tí: Hevur pápi okkara og/ella viðkomandi persónur rætt til at gera hini systkini arvaleys? Og um persónurin ikki vil gjalda peningin inn aftur á kontoina, hvat hendir so víðari við málinum?

Kann viðkomandi biðja fyri okkum ókendar persónar um at verða vitni til, at viðkomandi gevur sær sjálvum rætt til at fáa allan peningin fluttan á kontu sína?

Eru øll systkini ikki tvangsarvingar til arvin eftir mammu okkara?

Og kann tað passa, at um vit krevja okkara rætt til arvin ígjøgnum skiftirættin, so skulu vit gjalda kr. 55.000 til sakførara, áðrenn farið verður víðari við sakini?

*Eg skilji tekstin soleiðis, at móður tygara doyði fyri 30 árum síðani og síðani valdi faðir tygara at sita í óskiftum búgvi. Eftirfylgjandi er faðir tygara deyður og nú skal arvurin deilast.*

*Viðvíkjandi spurninginum í hvønn mun tit kunna gerast arvaleys, so er helvtin av arvinum tvangsarvur. Sjálvt um ein er tvangsarvingur, er tó ikki vissa fyri at nakað verður at arva. Tá eftirsitandi hjúnafelagin situr í óskiftum búgvi, er útgangsstøðið, at viðkomandi kann ráða yvir tí óskifta búnum sum ein eigari. Tó eru ásetingar í arvalógini um at eftirsitandi hjúnafelagin ikki má misbrúka sín rætt at ráða yvir óskifta búnum. Um so er, at faðir tygara hevur givið burtur so at siga allar ognirnar í búnum vil eg meta tað sannlíkt, at talan er um misbrúk, og at tit tískil undir ávísum treytum kunna krevja ognirnar ella virði av teimun aftur til búgvið.*

*Viðvíkjandi spurninginum um hvat hendir um persónurin ikki vil gjalda peningin inn aftur á kontoina er at siga, at tað fyrst má metast um viðkomandi persónur hevur skyldu at rinda peningin aftur til búgvið. Um viðkomandi hóast skyldu at gjalda, ikki sjálvboðin vil rinda peningin, verður neyðugt at stevna viðkomandi fyri rættin fyri at fáa dóm fyri at viðkomandi hevur skyldu at rinda peningin til búgvið.*

*Viðvíkjandi spurninginum um vitnir, so vil eg meta tað líka mikið um vitnini eru tykkum kend ella ókend. Undirritaði er ikki greiður yvir, hvat viðkomandi vitnir hava vitnað í hesum føri, og tí fái eg ikki svarað spurninginum nærri.*

*Viðvíkjandi spurninginum um tvangsarv, so eru tit øll, sambært tí sum er upplýst, tvangsarvingar í búnum eftir móðir tygara.*

*Viðvíkjandi spurninginum um rindan av kr. 55.000,- til sakførara áðrenn farið verður víðari við sakini, so er tað óvanligt at rindast skal kr. 55.000,- til sakførara sum fyritreyt fyri at fara víðari við sakini. Tó kann skiftirætturin vanliga krevja, at tey systkin sum vilja leggja sak, skulu standa inni fyri at møguligur kostnaður verður goldin.*

LØGREGLAN

### Hvat gera vit við skilaleysa koyring

Vit hava livað við einum ótolandi trupulleika leingi. Ein ungur maður í gøtuni, har vit búgva, koyrir púra ábyrgdarleyst. Vit búgva í eini blindari gøtu, men kortini so setur hesin bilførarin speedaran í botn, uttan mun til, nær og hvussu umstøðurnar eru. Vit hava sagt tað við hann fleiri ferðir, men hann tekur okkum ikki í álvara. Nógv smábørn búgva í gøtuni, og tað eru tey, vit fyrst og fremst hava ampa av. Vit hava ikki sagt nakað við politiið. Vit hava jú eingi prógv, men hvat heldur løgreglumaðurin, at vit skulu gera?

*Keðiligt, at ein ungur bilførari "terroriserar" eina gøtu við síni skilaleysu koyring. Tað verður ikki nevnt í spurninginum, um tosað hevur verið við foreldrini at unga manninum, sjálvt um viðkomandi er yvir 18 ár, tá ikki nyttar at tosað við mannin sjálvan. Tað er kanska ein møguleiki.*

*Tey, sum koyra, skulu altíð hava fyrilit og vera ansin so ikki øðrum gerst vandi, skaði ella ónáðir, og ferðin skal altíð laga seg eftir viðurskiftunum við fyriliti fyri tryggleika hjá øðrum.*

*Boðast eigur politinum frá í slíkum førum, so politiið kann halda eyga við bilføraranum. Tað kann vera, at viðkomandi er fyrr kendur fyri skilaleysa koyring.*

*Viðkomandi kann eisini meldast til politiið fyri fyrilitarleysa koyring. Tá skal politiið skriva frágreiðing og lýsa skilaleysu koyringina soleiðis sum fráboðarin hevur sæð hana.*




Tryggingarfelagið Trygd ynskir STÍF hjartaliga tillukku við steypinum...
TRYGD
Tórsgøta 16 Postboks 44 110 Tórshavn Tel 31 16 77 Fax 31 72 11